# Føroya Ráfiskakeyparafelag

# Ársfrágreiðing fyri 2012

Ein lýsing av fiskivinnuni og virkseminum hjá felagnum

VINNUHÚSIÐ
HOUSE OF INDUSTRY

## Samandráttur og frágreiðing frá nevndini

Í 2012 vóru lønargjaldingarnar í fiskavøruídnaðinum 304 mió. kr. í mun til 257 mio kr. í 2011. Umframt beinleiðis lønargjaldingar hevur avleidda virksemið frá fiskavøruídnaðinum eisini stóran samfelagsbúskaparligan týdning. Avleidda virksemið er t.d. innkeyp, fígging, flutningur, umvælingar, viðlíkahald, og aðrar vørur og tænastur, sum fyritøkur í fiskavøruídnaðinum eftirspyrja.

Samlaða útflutningsvirðið á fiskavørum í 2012 táttaði í 5 mia. kr., í mun til góðar 4,5 mia. kr. í 2011. Eisini í nøgd vaks útflutningurin av fiskavørum aftur, so nøgdin í 2012 var uml. 350 tús. tons.

Gongdin í feskfiskaveiðuni er tó framvegis negativ, og minkaði aftur nakað í 2012, úr 85 tús. tons í 2011 niður í 82 tús. tons 2012. Støðan í heimaflotanum er ring, og eingi tekin eru um nakran bata.

Ymisk mál hava merkt virksemið hjá felagnum farna árið.

*Atgongd til nýggjar marknaðir*

Felagið hevur roynt at sannført myndugleikarnar um at nýta orku uppá at tryggja føroyskum fiskaútflytarum betri marknaðaratgongd á nýggjum vakstrarmarknaðum í Suðuramerika og í Asia. Føroyskir myndugleikar hava nú í nógv ár ført ein vinnupolitikk, har endamálið skal vera at skapa so góðar karmar fyri vinnuna sum gjørligt, heldur enn at veita stuðul. Tað má tó staðfestast, at karmarnir fyri fiskavirkini og fiskaútflytarar eru lítið broyttir ella betraðir hesi seinnu nógvu árini.

Tí er tað at fegnast um, at landið í ár hevur latið Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eina játtan, sum er ætlað at gera avtalur við onnur lond um marknaðaratgongd fyri føroyskar fiskavørur. Í fyrstu atløgu verður hugsað um marknaðin í Brasil og Canada. Heilsufrøðiliga Starvsstovan er í samstarvi við uttanríkisdeildina á Løgmansskristovuni og Ráfiskakeyparafelagið farin undir tilgongdina at fáa marknaðaratgongd til Brasil. Enn er torført at siga, hvussu drúgv tilgongdin verður. Langsiktaða málið má vera, at føroyskir fiskaútflytarar hava góða marknaðaratgongd til áhugaverdar marknaðir kring allan heim. Brasil og Canada eiga bert at vera byrjanin, og tá hesir marknaðir eru komnir uppá pláss, má arbeiðast víðari við øðrum londum ella samgongum.

*Avtaka uppboðssølukravið*

Felagið hevur seinasta tvey árini í fleri umførum heitt á Fiskimálaráðið um at avtaka uppboðssølukravið fyri óvirkaðan fisk. Felagið hevur við hagtølum frá Hagstovu Føroya víst á, at uppboðssølukravið ikki tykist hava haft nakra ávirkan á nøgdina av óvirkaðum

fiski sum fer av landinum, og at tað tí tykjast verða onnur viðurskifti enn lógarverkið, sum avger, hvussu nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum. Samstundis skapar uppboðssølukravið eyka umsiting fyri ráfiskakeypararnar og tað almenna, umframt at tað verður verri hjá ráfiskakeyparunum at samstarva við seljararnar um eitt nú verkætlanir at økja um góðskuna á rávøruni. Harumframt ger uppboðssølukravið tað oftani torført at fáa besta prísin á marknaðinum úti í heimi.

Nú fyriliggur so eitt uppskot til kunngerð um at strika uppboðssølukravið, fyribils hetta fiskiárið út. Tá tað nærkast 1. September kann Fiskimálaráðið so meta um tað ikki er vert at strika uppboðssølukravið með alla.

Hóast uppboðssølukravið verður strikað, verður tað tó framvegis gjørligt at selja fiskin um uppboðssøluna, og lítil ivi er um, at seljarar framvegis í stóran mun fara at nýta uppboðssøluna.

*Veiðiváttanir*

Skipanin við veiðiváttinum, sum varð sett í gildi 1. Januar 2010 hevur víst seg at viðføra stóra umsiting hjá útflytarunum, sum tykist vera óneyðug fyri at røkka endamálinum við skipanini (t.e. at forða fyri IUU-fiskiskapi).

Harumframt hevur tað víst seg, at gjøldini fyri at avgreiða veiðuváttanirnar í s.v. útflutning bara hækka, ikki minst í Danmark. Frá 1. Januar 2013 hava veiðiváttanir úr Noregi tó fingið status sum lág-risiko veiðiváttanir, og umsitingar- og avgreiðslugjaldið í Danmark er tí lækkað fyri norskar veiðiváttanir. Felagið hevur sett seg í samband við Fiskimálaráðið fyri at kanna møguleikan fyri at Føroyar fáa líknandi avtalu. Ætlanin er at arbeiða við hesum máli komandi tíðina. Skal tað eydnast at fáa eina betri avtalu við Danmark um veiðiváttanir er umráðandi, at tey sum útfylla veiðiváttanirnar eru neyv, so talið av feilum verður so lítið sum gjørligt.

*Fosfat-málið*

Málið um at fáa fosfat góðkent sum tilsetingarevni til saltfisk er helst tað einstaka málið sum umsitingin í felagnum hevur brúkt mestu orkuna uppá í farna ári. Málið er ein teknisk handilsforðing, og er tað klippfiskavinnan í Portugal, sum ferð eftir ferð hevur klárað at fingið útsett hetta málið. Hetta er hent hóast bæði DG SANCO, sum umsitur málið, og serfrøðingar hjá limalondunum eru komnir til ta niðurstøðu, at umsóknin er væl grundað, og at eingin atlit tala fyri at nokta umsóknini. Fyri saltfiskavinnuna í Norðurlondum er tað tí púra óskiljandi, at málið ikki verður avgreitt.

Felagið arbeiðir eisini saman við føroyskum og útlendskum samstarvspørtum um hetta mál.

*Marknaðarføring av føroyskum fiski*

Felagið hevur í farna ári arbeitt saman við Fiskamarknaði Føroya og Ráfiskaseljarafelagnum um at framleiða ein film um føroyskan fisk og føroyska fiskivinnuumsiting. Endamálið er at geva útflytarum og øðrum ein platform at fortelja tær góðu søgurnar um føroyska fiskivinnnu og føroyskan fisk.

Gourmet-kokkar kring alt Evropa byrja at fáa eyguni upp fyri, at føroyskur fiskur er øðrvísi í smakki og konsistensi enn annar fiskur. Harumframt er nøgdin avmarkað, og fortreytirnar fyri at marknaðarføra og selja føroyskan fisk sum nakað heilt serligt eru tí til staðar, um vit bera okkum rætt at. Vit mugu eisini sjálvi duga at fortelja hesar søgur og til fiskainnflytarar og endabrúkarar.

Kovboy-film er tí biðið um at framleiða tríggjar filmar um føroyska fiskivinnu. Ein longri film á uml. 20 min, sum fortelur søguna um føroyskan fisk og fiskivinnuumsiting, og tveir styttri filmar á uml. 2 min. hvør, sum leggja dent á ávíkavist góðskuna á føroyskum fiski og á fiskivinnuumsitingina.

Vónandi er hetta bert byrjanin til eitt samstarv millum feløgini (og onnur við) um felags marknaðarføring av føroyskum fiski.

# Innihald

**INNGANGUR ........ 4**

*Føroya Ráfiskakeyparafelag ........ 4*

**UM FISKI- OG FLAKAVINNUNA ........ 5**

LØNARÚTGJALDINGAR Í FISKIVINNUNI ........ 5
ÚTFLUTNINGURIN ........ 6
RÁVØRUTILGONGDIN TIL VINNUNA ........ 8
MIÐAL AVREIÐINGARPRÍSIR ........ 9
ÚTFLUTNINGUR AV HEILUM KØLDUM FISKI ........ 9
AVREIÐINGAR UTTANLANDS ........ 10
FLAKAVINNAN ........ 11
VEIÐULIÐIÐ ........ 12
ÚTLITINI FYRI FISKISKAPIN UNDIR FØROYUM ........ 12

**VIRKSEMI FELAGSINS Í FARNA ÁRI ........ 14**

MARKNAÐARATGONGD ........ 14
AVTØKA AV UPPBOÐSSØLUKRAVINUM FYRI ÓVIRKAÐAN FISK ........ 14
BROYTTA SKIPAN FYRI VEIÐIVÁTTANIR ........ 15
ÚTFLUTNINGUR AV SALTFISKI TIL ES ........ 15
MARKNAÐARFØRING AV FØROYSKUM FISKI ........ 16
MÁL Í FISKIVINNURÁÐNUM ........ 16

**SKJAL 1: FISKAVØRUÚTFLUTNINGUR Í 2011 OG 2012 ........ 17**

# Inngangur

Henda ársfrágreiðing er løgd fram á aðalfundinum hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag tann 12. apríl 2013. Ráfiskakeyparafelagið er eitt áhugafelag hjá ráfiskakeyparum í Føroyum. Uppgávan hjá felagnum er at menna vinnuna í samstarvi við einstøku limirnar, myndugleikar og stovnar, ið varða av fiskivinnuni. Felagið heldur til í Vinnuhúsinum og hevur felags umsiting við Føroya Arbeiðsgevarafelag og onnur vinnufeløg.

Endamálið við frágreiðingini er at geva limum okkara og øðrum áhugaðum eina stutta lýsing av gongdini í fiski- og flakavinnuni og virksemi felagsins.

## Føroya Ráfiskakeyparafelag

Í nevndini fyri Føroya Ráfiskakeyparafelag eru:

Regin Mikkelsen, formaður

Jógvan Gregersen, næstformaður

Fríðin Ziskason

Ludvík við Stein

Marnar Pattinson

Limirnir í Føroya Ráfiskakeyparafelag eru pr. 11. apríl 2013:

| | |
|---|---|
| Delta Seafood | Sandoy Seafood P/F |
| J.M.A. v/Jógvan Absalonsen | Nevið P/F |
| Scrabster Seafood | Faroe Origin P/F |
| Tavan Sp/f | Kósin P/F |
| Vaðhorn Seafood P/F | Faroe4Fish |
| Fiskavirkið P/F | Rainbow Seafood Sp/f |
| Diamond Fish | FoFish Sp/f |

# Um fiski- og flakavinnuna

## Lønarútgjaldingar í fiskivinnuni

Um hugt verður eftir lønarútgjaldingum í fiskiskapi og fiskaframleiðslu frá 2006 til 2012 sæst, at í 2006 og 2007 vóru lønarútgjaldingarnar hjá fiskavirkjunum umleið 350 mió. kr. Í árunum 2008-2010 lá tað um 300 mió kr., og í 2011 var talið minkað til umleið 250 mió kr. Vit skulu heilt aftur til kreppuárini í 90'unum fyri at finna líknandi tal. Og tá er hædd ikki tikin fyri tann lønar- og prísvøkstur, sum hevur verið síðani tá. Í 2012 er talið komið upp um 300 mió kr. aftur, og er tað pelagiska óivað størsta orsøkin til hetta.

Fyri veiðuliðið sæst, at lønarútgjaldingarnar í 2006 og 2007 táttaðu í milliardina, men minkaðu niður á knappar 600 mió. kr. í 2009. Síðani hava lønarútgjaldingarnar tó kvinkað nakað uppeftir, soleiðis at tær í fjør og fyrraárið vóru knappar 800 mió. kr. tilsamans.

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Fiskiskapur | 937.606 | 951.947 | 724.205 | 576.131 | 714.181 | 783.008 | 772.116 |
| Fiskavøruídnaður | 362.330 | 349.730 | 314.920 | 302.561 | 313.903 | 257.229 | 304.138 |
| Tilsamans | 1.299.935 | 1.301.677 | 1.039.125 | 878.692 | 1.028.084 | 1.040.237 | 1076.254 |

## Útflutningurin

Samlaði føroyski útflutningurin av fiskavørum í nøgd og virði er vístur í mynd 1. Í nøgd er útflutningurin í 2012 gjørdur upp til umleið 356.000 tons, sum er væl hægri enn í 2011. Tað er serliga økingin í nøgdini av svartkjafti og laksi, sum er orsøk til økta tonsatalið. Útflutningsvirðið fyri samlaða fiskaútflutningin í 2012 hækkaði eisini í mun til 2011, hóast tað lutfalsliga ikki øktist heilt so nógv sum tonsatalið. Samlaða útflutningsvirðið av fiskavørum táttar nú í 5 milliardir krónur.




*Mynd 1. Útflutningur av fiskavørum: Nøgd og virði frá 2007 til 2012. (Kelda: Hagstova Føroya)*

Í skjali 1, sum sæst aftast í hesari frágreiðing, er eitt útgreinað yvirlit yvir útflutningsnøgd og –virði fyri flestu fiskasløg.

Samlaða útflutningsnøgdin av frystum og køldum flaki, úr toski, hýsu og upsa, var tilsamans eitt vet hægri í 2012 samanborið við 2011. Vøksturin var uml. 10%, men talið í 2011 var eisini sera lágt. Útflutningsvirðið av hesum vørum vaks næstan líka nógv sum nøgdin. Flaktur toskur og hýsa fingu eitt sindur verri prís pr. kg, meðan hýsa og onnur fiskasløg fingu betri prís. Um hugt verður eftir øllum fiskasløgunum undir einum, helt miðalprísurin á flaktum fiski sær tó rímuliga væl, hóast upsin hevði størsta vøksturin í tonsum.

| | Nøgd í tonsum 2011 | Nøgd í tonsum 2012 | Virði í 1.000 kr. 2011 | Virði í 1.000 kr. 2012 | Miðalprísur/kg. 2011 | Miðalprísur/kg. 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Flak, fryst og kølt** | | | | | | |
| Toskur | 6.433 | 6.633 | 224.303 | 227.151 | 34,87 | 34,24 |
| Hýsa | 549 | 553 | 13.746 | 14.603 | 25,04 | 26,41 |
| Upsi | 10.822 | 12.420 | 316.826 | 356.775 | 29,28 | 28,73 |
| Onnur fiskasløg | 966 | 979 | 31.013 | 41.912 | 32,11 | 42,83 |
| **Tilsamans** | **18.770** | **20.585** | **585.887** | **640.440** | **31,21** | **31,11** |
| **Saltfiskur, flaktur og flak** | | | | | | |
| Toskur | 5.765 | 4.156 | 242.804 | 170.870 | 42,12 | 41,11 |
| Hýsa | 0 | 0 | 0 | 0 | | |
| Upsi | 5.215 | 0 | 97.944 | 0 | 18,78 | 0,00 |
| Onnur fiskasløg | 5.535 | 5.877 | 158.134 | 174.799 | 28,57 | 29,74 |
| **Tilsamans** | **16.515** | **10.033** | **498.882** | **345.670** | **30,21** | **34,45** |
| **Heilur fiskur, frystur og køldur** | | | | | | |
| Toskur | 2.432 | 1.415 | 46.645 | 29.301 | 19,18 | 20,70 |
| Hýsa | 3.130 | 2.086 | 52.666 | 32.946 | 16,83 | 15,79 |
| Upsi | 1.126 | 396 | 15.730 | 6.523 | 13,97 | 16,49 |
| Onnur fiskasløg | 16.540 | 18.866 | 303.305 | 261.109 | 18,34 | 13,84 |
| **Tilsamans** | **23.228** | **22.763** | **418.347** | **329.880** | **18,01** | **14,49** |

*Mynd 2. Útflutningur í nøgd og virði, býtt á vørubólkar av toski, hýsu og upsa 2010 og 2011 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Nøgdirnar av útfluttum saltfiski vóru munandi minni í 2012 í mun í 2011, heili 40 % minni. Umframt at nøgdin á toski minkaði nógv, varð eingin saltfiskur úr upsa útfluttur í 2012. Miðalprísurin fyri saltfiskin kvinkaði uppeftir, men orsøkin til hetta er, at tann bíligari upsin ikki varð framleiddur til saltfisk í 2012. Miðalprísurin fyri saltfiski úr toski minkaði nakað, meðan onnur fiskasløg fingu eitt sindur betri prís í miðal.

Samlaða útflutningsvirðið av saltfiski er soleiðis lækkað við uml. 90 mió kr. í 2012 í mun til 2011.

Útfluttu nøgdirnar av frystum og feskum óvirkaðum fiski helt fram at minka. Serliga stór var minkingin í fiskasløgunum toskur, hýsa og upsi. Virðið er eisini minkað munandi, einamest tí størri partur av útflutninginum var onnur fiskasløg, og at hesi fingu ein verri miðalprís.

## Rávørutilgongdin til vinnuna

Um hugt verður eftir fiskiskapinum seinastu tvey árini kann staðfestast, at feskfiskaveiðan í 2012 aftur minkaði í mun til árið fyri. Samanlagt er feskfiskaveiðan síðan 2010 minkað við uml. einum fjórðingi. Toskur og hýsa eru stak illa fyri, og er fiskiskapurin eftir hesum fiskasløgum bert ein viðfáningur av, hvat hann var fyri nøkrum árum síðani. Nøgdin av upsa er økt við uml. 5.000 tonsum, men er framvegis munandi lægri enn fyri fáum árum síðani. Nøgdin á flatfiski er óbroytt.

Avreiðingarvirðið á feskum fiski var 774 mió. kr. í 2012 ímóti 828 mió. kr. í 2011. Hyggja vit longur aftur, kunnu vit síggja, at avreiðingarvirðið í 2007 var 1,16 mia. kr. og í 2006 1,25 mia. kr. Hetta merkir, at avreiðingarvirðið á feskum fiski var næstan 440 mió. kr. lægri í 2012 enn í 2006.

| | Nøgd í tons | | Virði í 1.000 kr. | | Miðalprísur pr. Kg | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| **Fiskaslag** | **2011** | **2012** | **2011** | **2012** | **2011** | **2012** |
| **Toskur** | 12.142 | 8.556 | 185.253 | 127.813 | 15,26 | 14,94 |
| **Hýsa** | 3.357 | 2.613 | 42.124 | 30.012 | 12,55 | 11,49 |
| **Upsi** | 27.557 | 32.376 | 252.797 | 287.316 | 9,17 | 8,87 |
| **Annar botnfiskur** | 12.764 | 12.968 | 122.433 | 133.576 | 9,59 | 10,30 |
| **Flatfiskur tils.** | 4.518 | 4.546 | 123.074 | 112.933 | 27,24 | 24,84 |
| **Onnur fiskasløg tils.** | 24.771 | 21.194 | 102.286 | 82.112 | 4,13 | 3,87 |
| **Veiðan tilsamans** | 85.108 | 82.253 | 827.967 | 773.762 | | |

*Mynd 3. Feskfiskaveiða: Nøgd, virði og miðalprísur í 2011 og 2012 (Kelda: Hagstova Føroya)*

Í 2010 tók toskafiskiskapurin fyri fyrstu ferð í 8 ár seg eitt sindur uppaftur, men er so minkaður aftur í 2011 og 2012.

Fiskiskapurin eftir hýsu er nú minkaður í sjey ár á rað. Veiðunøgdin í 2003 var umleið 24.600 tons, meðan hon í 2012 bert var uml. 2.600 tons, og er nú bert ein viðfáningur av nøgdini fyri seks árum síðani.

Upsafiskiskapurin, ið sum heild hevur verið javnt góður í nógv ár, minkaði í 2011 við umleið 13.000 tonsum, men er so aftur øktur við uml. 5.000 tonsum í 2012.

Umframt at nøgdin sum heild er minkað, er avreiðingarprísurin pr. kg. eisini minkaður. Sum tað sæst í talvuni omanfyri, eru avreiðingarprísirnir allir uttan ein lækkaðir í 2012 í mun til 2011.

## Miðal avreiðingarprísir

Í Mynd 4 fæst ein greiðari mynd av gongdini í miðal avreiðingarprísunum á toski, hýsu og upsa frá 2006 til 2012. Myndin vísir, at miðalprísurin fyri tosk er minkaður seinastu árini. Hýsuprísurin er meira støðugur, meðan upsaprísurin er sum heild er øktur hesi seinastu áriini. Gongdin hevur haft við sær, at munurin millum avreiðingarprísunum á hesum fiskasløgum er vorðin nógv minni. Eftir at miðal avreiðingarprísurin á toski í 2007 var nærum tað fimmfalda av upsaprísinum, var toskaprísurin í 2012 bert hálvaaðru ferðir upsaprísin.




*Mynd 4. Miðalprísir á toski, hýsu og upsa frá 2006-2012 (Kelda: Hagstova Føroya)*

## Útflutningur av heilum køldum fiski

Síðani ógvusligu hækkingina í tíðarskeiðnum frá 2000 til 2003 hevur útflutningurin av heilum køldum fiski verið javnt minkandi, og er nú samanlagt lægri enn hann hevur verið fyrr í hesari øldini.




| | 2000 | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Toskur | 3.470 | 4.486 | 10.18 | 8.396 | 6.182 | 4.371 | 3.676 | 1.884 | 1.725 | 2.201 | 3.284 | 2.222 | 1.190 |
| Hýsa | 4.244 | 6.445 | 13.18 | 14.42 | 12.10 | 10.57 | 9.506 | 7.052 | 4.366 | 3.752 | 3.917 | 2.831 | 1.843 |
| Upsi | 1.814 | 5.210 | 11.26 | 13.20 | 9.374 | 11.87 | 4.214 | 3.932 | 1.574 | 3.348 | 1.528 | 1.126 | 396 |

*Mynd 5. Útflutningur av heilum køldum fisk frá 2000-2012 (Kelda:Hagstova Føroya).*

Samlaða nøgdin av toski, hýsu og upsa, sum fór óvirkað av landinum, var í 2012 góð 3.000 tons í mun til góð 6.000 tons í 2011.

## Avreiðingar uttanlands

Mynd 6 vísir gongdina í avreiðingum uttanlands. Tað sæst, at eftir eina lítla hækking í 2011, minkaðu nøgdirnar nakað aftur í 2012.




*Mynd 6. Landingar uttanlands 2000-2011 (Kelda: Fiskiveiðieftirlitið)*

Samlaða nøgdin avreidd uttanlands í 2012 var góð 5.000 tons í mun til 12.000 tons í 2011. Tó kemur tað nú nærum ikki fyri, at toskur, hýsa og upsi verða avreidd uttanlands og tað er tí bert onnur fiskasløg, sum verða avreidd uttanlands.

## Flakavinnan

Samlað sæð hava seinastu nógvu árini verið avbjóðandi hjá føroysku flakavinnuni. Fallandi rávørunøgdir og óstøðug marknaðarviðurskifti hava verið høvuðsatvoldin til stóru avbjóðingarnar.

Hóast umstøðurnar eru sera avbjóðandi í løtuni, eru tað tó einstøk virki sum klára seg hampuliga væl. Eyðkennið við flestu av hesum virkjunum er sera lítil skuld og góð tillagingarevnir í mun til minkandi rávørugrundarlag.

Fyri nøkrum árum síðani høvdu virkini sera trupult við at fáa arbeiðsmegi til virkini. Hetta er tó ikki ein stórur trupulleiki í løtuni, og er hetta til frama fyri vinnugreinina sum heild. Í mun til restina av Evropa er arbeiðsloysið í Føroyum lágt, og ein øking av virkseminum í búskapinum kann tí føra til fløskuhálsar, so flakavirkini aftur fáa trupulleikar við at fáa arbeiðsmegi. Føroysk virki eiga tí framvegis at fáa møguleikan frítt at seta eisini útlendsk starvsfólk, tá tað er neyðugt.

Í løtuni eru tað tó aðrar avbjóðingar sum minkandi rávørutilgongd og minkandi eftirspurningur og keypiorka á høvuðsmarknaðunum, sum eru fremstu vandamálini. Tað er tí alneyðugt, at okkara myndugleikar bera so í bandi, at teir tryggja virkjunum møguleikar at kunna selja fiskin á teimum marknaðum, sum eru vaksandi, eitt nú í

Suðuramerika og Asia. Bert við góðari marknaðaratgongd kann tað tryggjast, at fyritøkurnar fáa besta prísin fyri fiskin, samfelagnum at gagni.

## Veiðuliðið

Sum tað eisini er greitt frá frammanfyri, var samlaða feskfiskaveiðan í 2012 umleið 82.000 tons, sum er tað lægsta í hesari øldini. Verður hugt eftir einstøku skipabólkunum sæst, at allir skipabólkar hava haft afturgongd, uttan í bólkinum gørn og annað.

| | 2006 | 2007 | 2008 | 2009 | 2010 | 2011 | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Lemmatrol** | 32.405 | 32.503 | 21.840 | 20.235 | 17.484 | 10.992 | 8.941 |
| **Partrol** | 61.912 | 57.238 | 63.344 | 65.179 | 57.709 | 49.342 | 46.819 |
| **Lína** | 32.573 | 26.257 | 21.787 | 19.658 | 23.688 | 20.549 | 19.491 |
| **Snella** | 3.232 | 2.028 | 1.853 | 3.776 | 3.857 | 2.929 | 2.091 |
| **Gørn og annað** | 3.182 | 3.019 | 2.986 | 2.596 | 2.769 | 1.296 | 4.910 |
| **Reiðskapur tils** | 133.303 | 121.045 | 111.809 | 111.444 | 105.506 | 85.108 | 82.253 |

*Mynd 8. Fiskiskapurin hjá heimaflotanum frá 2006-2012 í tonsum (Kelda: Hagstova Føroya)*

Føroyski heimaflotin hevur havt sera stórar avbjóðingar seinastu árini, og støðan bara versnar. Fallandi fiskiskapur og lágir prísir hava merkt vinnuna.

## Útlitini fyri fiskiskapin undir Føroyum

Í grundgevingunum fyri sínum tilmæli til fiskiskapin undir Føroyum í fiskiárinum 2012/2013 skrivaði Havstovan um toskastovnin á landgrunninum, at gýtingarstovnurin hevur verið sera lítil síðani 2005. Hóast ein lítil vøkstur er hann er nær minsta markinum fyri, hvat er ráðiligt. ICES hevur í sínum tilmæli mælt til, at veiðitrýstið verður minkað við 63%. Eingin ivi er sostatt um, at toskastovnurin er illa fyri.

Havstovan skrivar eisini, at toskurin á Føroyabanka er framvegis er illa fyri og eingin tekin eru um at hann er í menning. Havstovan mælir tí framvegis til, at eingin toskafiskiskapur verður loyvdur á Føroyabanka.

Hýsustovnurin er eisini sera illa fyri og hevur framvegis alla vernd fyri neyðini. Hýsustovnurin hevur síðani 2010 verið undir markinum fyri, hvat er ráðiligt, og gýtingarstovnurin vil sjálvt við ongari veiðu halda seg undir minstamarkinum.

Upsastovnurin verður framvegis mettur at vera væl fyri og gýtingarstovnurin at vera hægri enn minstamarkið hjá ICES, tó at gýtingarstovnurin er minkaður seinnu árini. Veiðutrýstið eftir upsa er tó framvegis ov høgt, hóast tað er minkað nakað seinnu árini.

Yvirskipað mælir Havstovan til, at ein umsitingarætlan verður gjørd, sum m.a. ásetur hvørji tiltøk skulu setast í verk, tá gýtingarstovnurin minkar niður um ávísa stødd, so gýtingarstovnarnir kunnu koma fyri seg aftur.

Samanfatandi mælti Havstovan til, at skerja dagatalið hjá bólkunum 3, 4 og 5 við 20 % sum liður í einari ætlan at stilla veiðitrýstið rætt. Eisini verður mælt til at dagatalið hjá bólki 2, sum serliga fiskar upsa, kann verða tað sama sum árið fyri. Harumframt mælir Havstovan til at brúka aðrar reguleringar fyri at geva smáfiski betri møguleikar at vaksa seg inn í fiskiskapin.

Samanumtikið mugu vit ásanna, at útlitini fyri fiskiskapinum eftir toski og hýsu eru vánalig, og at tað er mangt, ið bendir á, at veiðunøgdin av toski og hýsu undir Føroyum ikki verður størri í 2013 í mun til 2012.

Upsastovnurin verður sagdur at vera væl fyri, men higartil í 2013 hevur upsafiskiskapurin verið lakari enn í 2012. Útlitini fyri nøgdunum av upsa eru tískil torfør at meta um.

# Virksemi felagsins í farna ári

Niðanfyri er ein stutt lýsing av nøkrum av teimum málum, sum hetta seinasta árið hava myndað virksemið hjá Føroya Ráfiskakeyparafelag.

Á aðalfundinum í 2012 stóðu Jógvan Gregersen og Petur H. Mohr fyri vali. Jógvan Gregersen varð afturvaldur, meðan Petur H. Mohr ikki stillaði upp aftur. Fyri hann var Marnar Pattinson valdur í nevndina. Seinni skipaði nevndin seg við Regin Mikkelsen sum formanni og Jógvan Gregersen sum næstformanni.

## Marknaðaratgongd

Felagið hevur roynt at sannført myndugleikarnar um at nýta orku uppá at tryggja føroyskum fiskaútflytarum betri marknaðaratgongd á nýggjum vakstrarmarknaðum í Suðuramerika og í Asia. Landið hevur nú í nógv ár ført ein vinnupolitikk, har endamálið skal vera at skapa so góðar karmar fyri vinnuna sum gjørligt, heldur enn at veita stuðul. Tað má tó staðfestast, at karmarnir fyri fiskavirkini og fiskaútflytarar eru lítið broyttir ella betraðir hesi seinnu nógvu árini.

Tí er tað at fegnast um, at landið í ár hevur latið Heilsufrøðiligu Starvsstovuni eina játtan, sum er ætlað at gera avtalur við onnur lond um marknaðaratgongd fyri føroyskar fiskavørur. Í fyrstu atløgu verður hugsað um marknaðin í Brasil og Canada. Heilsufrøðiliga Starvsstovan er í samstarvi við uttanríkisdeildina á Løgmansskristovuni og Ráfiskakeyparafelagið farin undir tilgongdina at fáa marknaðaratgongd til Brasil. Enn er torført at siga, hvussu drúgv tilgongdin verður, men týdningarmikið er, at landsins myndugleikar raðfesta hetta arbeiðið og seta neyðugu orkuna av til verktætlanina. Langsiktaða málið má vera, at føroyskir fiskaútflytarar hava góða marknaðaratgongd til áhugaverdar marknaðir kring allan heim. Brasil og Canada eiga bert at vera byrjanin, og tá hesir marknaðir eru komnir uppá pláss, má arbeiðast víðari við øðrum londum ella samgongum.

## Avtøka av uppboðssølukravinum fyri óvirkaðan fisk

Felagið hevur seinasta tvey árini í fleri umførum heitt á Fiskimálaráðið um at avtaka uppboðssølukravið fyri óvirkaðan fisk. Felagið hevur við hagtølum frá Hagstovu Føroya víst á, at uppboðssølukravið ikki tykist hava haft nakra ávirkan á nøgdina av óvirkaðum fiski sum fer av landinum, og at tað tí tykjast verða onnur viðurskifti enn lógarverkið, sum avger, hvussu nógvur fiskur fer óvirkaður av landinum. Samstundis skapar uppboðssølukravið eyka umsiting fyri ráfiskakeypararnar og tað almenna, umframt at tað verður verri hjá ráfiskakeyparunum at samstarva við seljararnar um eitt nú

verkætlanir at økja um góðskuna á rávøruni. Harumframt ger uppboðssølukravið tað oftani torført at fáa besta prísin á marknaðinum úti í heimi.

Hóast talan ikki er um eitt torført mál at loysa, hevur tað tikið drúgva tíð hjá Fiskimálaráðnum at viðgera hetta málið. Nú hevur Fiskimálaráðið tó gjørt uppskot til kunngerð um at strika uppboðssølukravið, fyribils hetta fiskiárið út. Tá tað nærkast 1. September kann Fiskimálaráðið so meta um tað ikki er vert at strika uppboðssølukravið með alla.

Hóast uppboðssølukravið verður strikað, verður tað tó framvegis gjørligt at selja fiskin um uppboðssøluna, og lítil ivi er um, at seljarar framvegis í stóran mun fara at nýta uppboðssøluna.

## Broytta skipan fyri veiðiváttanir

Skipanin við veiðuváttinum, sum varð sett í gildi 1. Januar 2010 hevur víst seg at viðføra stóra umsiting hjá útflytarunum, sum tykist vera óneyðug fyri at røkka endamálinum við skipanini (t.e. at forða fyri IUU-fiskiskapi). Hóast Fiskiveiðueftirlitið hevur gjørt eina elektroniska skipan, er eitt nú íslendska skipanin einfaldari, og skapar ikki líka stóra umsiting.

Harumframt hevur tað víst seg, at gjøldini fyri at avgreiða veiðuváttanirnar í s.v. útflutning bara eru hækkaði, ikki minst í Danmark. Frá 1. Januar 2013 hava veiðiváttanir úr Noregi tó fingið status sum lág-risiko veiðiváttanir, og umsitingar- og avgreiðslugjaldið í Danmark er tí lækkað fyri norskar veiðiváttanir. Felagið hevur sett seg í samband við Fiskimálaráðið fyri at kanna møguleikan fyri at Føroyar fáa líknandi avtalu. Ætlanin er at arbeiða við hesum máli komandi tíðina. Skal tað eydnast at fáa eina betri avtalu við Danmark um veiðiváttanir er umráðandi, at tey sum útfylla veiðiváttanirnar eru neyv, so talið av feilum verður so lítið sum gjørligt.

## Útflutningur av saltfiski til ES

Málið um at fáa fosfat góðkent sum tilsetingarevni til saltfisk er helst tað einstaka málið sum umsitingin í felagnum hevur brúkt mestu orkuna uppá í farna ári. Málið er ein teknisk handilsforðing, og er tað klippfiskavinnan í Portugal, sum ferð eftir ferð hevur klárað at fingið útsett hetta málið. Hetta er hent hóast bæði DG SANCO, sum umsitur málið, og serfrøðingar hjá limalondunum eru komnir til ta niðurstøðu, at umsóknin er væl grundað, og at eingin atlit tala fyri at nokta umsóknini. Fyri saltfiskavinnuna í Norðurlondum er tað tí púra óskiljandi, at málið ikki verður avgreitt.

Felagið arbeiðir eisini saman við føroyskum og útlendskum samstarvspørtum um hetta mál.

## Marknaðarføring av føroyskum fiski

Felagið hevur í farna ári arbeitt saman við Fiskamarknaði Føroya (prosjektleiðari) og Ráfiskaseljarafelagnum um at framleiða ein film um føroyskan fisk og føroyska fiskivinnuumsiting. Endamálið er at geva útflytarum og øðrum ein platform at fortelja tær góðu søgurnar um føroyska fiskivinnnu og føroyskan fisk.

Gourmet-kokkar kring alt Evropa byrja at fáa eyguni upp fyri, at føroyskur fiskur er øðrvísi í smakki og konsistensi enn annar fiskur. Harumframt er nøgdin avmarkað, og fortreytirnar fyri at marknaðarføra og selja føroyskan fisk sum nakað heilt serligt eru tí til staðar, um vit bera okkum rætt at. Vit mugu eisini sjálvi duga at fortelja hesar søgur til fiskainnflytarar og endabrúkarar úti í heimi.

Kovboy-film er tí biðið um at framleiða tríggjar filmar um føroyska fiskivinnu. Ein longri filmur á uml. 20 min, sum fortelur alla søguna um føroyskan fisk og fiskivinnuumsiting, og tveir styttri filmar á uml. 2 min. hvør, sum leggja dent á ávíkavist góðskuna á føroyskum fiski og á fiskivinnuumsitingina.

Í sambandi við marknaðarføringina av filminum verður í samstarvi við sendistovuna í Brussel eisini skipað fyri einari móttøku á ESE, har eisini teir luttakandi fiskaútflytararnir fáa høvi at bjóða sínum kundum við. Nýggi filmurin verður eisini vístur á móttøkuni.

Vónandi er hetta bert byrjanin til eitt samstarv millum feløgini (og onnur við) um felags marknaðarføring av føroyskum fiski.

## Mál í Fiskivinnuráðnum

Felagið hevur í farna ári gjørt sína ávirkan galdandi gjøgnum sína luttøku í Fiskivinnuráðnum. Millum tey mál, sum eru viðgjørd, eru m.a. makrelfiskiskapurin, broytingar í ymiskum kunngerðum, og ymiskar broytingar í lógini um vinnuligan fiskiskap.

# Skjal 1: Fiskavøruútflutningur í 2011 og 2012

Útflutningsvirði er gjørt upp í FOB=Free On Board
Kelda: Hagstova Føroya

| | Virði í 1.000 DKK | | | Nøgd í tonsum | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **2011** | **2012** | **Munur** | **2011** | **2012** | **Munur** |
| Állur | 0 | 46 | 46 | 0 | 1 | 1 |
| Annar fiskur, i.a.n. | 131.544 | 203.652 | 72.108 | 9.714 | 13.046 | 3.332 |
| Annar flundrufiskur, i.a.n. | 1.005 | 2.294 | 1.290 | 39 | 65 | 26 |
| Annar ídnaðarfiskur, i.a.n. | 2.087 | 6.553 | 4.466 | 1.023 | 749 | -275 |
| Blálonga | 24.340 | 13.634 | -10.706 | 1.492 | 854 | -638 |
| **Brosma** | **54.678** | **55.744** | **1.066** | **2.221** | **2.016** | **-205** |
| Búrfiskur | 3.313 | 1.977 | -1.336 | 94 | 108 | 14 |
| Glashvoysa | 2.772 | 9 | -2.763 | 36 | 0 | -36 |
| **Gullaksur** | **125.496** | **96.227** | **-29.269** | **10.802** | **8.348** | **-2.454** |
| Havtaska | 74.139 | 37.901 | -36.238 | 1.396 | 689 | -707 |
| Hávur | 1.357 | 4.206 | 2.849 | 100 | 379 | 279 |
| Hummari | 9.467 | 6.903 | -2.564 | 59 | 47 | -12 |
| Hvítingsbróður | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Hvítingur | 7.827 | 10.874 | 3.047 | 386 | 435 | 49 |
| **Hýsa** | **68.216** | **62.280** | **-5.937** | **3.763** | **3.355** | **-409** |
| Hømguslokkur | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Jákupsskel | 18.164 | 31.104 | 12.940 | 886 | 1.398 | 512 |
| Kalvi | 6.562 | 10.213 | 3.651 | 134 | 184 | 50 |
| Kikarafiskur | 585 | 0 | -585 | 60 | 0 | -60 |
| Kongafiskur | 66.250 | 37.370 | -28.880 | 2.859 | 1.708 | -1.151 |
| Krabbi | 6.502 | 3.766 | -2.736 | 194 | 106 | -87 |
| Kræklingur | 5 | 0 | -5 | 0 | 0 | 0 |
| Laksur | 1.611.891 | 1.821.459 | 209.568 | 46.055 | 59.063 | 13.008 |
| Langasporl | 872 | 0 | -872 | 68 | 0 | -68 |
| Livur | 1.978 | 1.793 | -185 | 105 | 89 | -17 |
| Lodna | 23.483 | 34.540 | 11.057 | 9.072 | 17.704 | 8.632 |
| **Longa** | **112.283** | **127.587** | **15.304** | **3.990** | **4.358** | **369** |
| Lýsi | 3.032 | 5.057 | 2.025 | 430 | 2.324 | 1.894 |
| Lýsingur | 0 | 13.053 | 13.053 | 0 | 3.180 | 3.180 |
| Makrelur | 709.994 | 826.751 | 116.757 | 103.222 | 95.312 | -7.911 |
| Nebbasild | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 | 0 |
| Onnur skeljadjór o.l. i.a.n. | 343 | 707 | 364 | 1.407 | 4.485 | 3.078 |
| Reyðsprøka | 10.013 | 6.010 | -4.002 | 383 | 262 | -121 |
| Rogn | 9.772 | 391 | -9.381 | 385 | 27 | -358 |
| Rækjur | 86.971 | 102.076 | 15.105 | 5.670 | 5.351 | -320 |
| Sardin | 1.833 | 2.961 | 1.128 | 719 | 251 | -468 |
| Síl | 8.724 | 195 | -8.529 | 238 | 26 | -212 |
| Sild | 288.543 | 324.578 | 36.035 | 50.100 | 43.895 | -6.205 |
| Skrubba | 31 | 0 | -31 | 4 | 0 | -4 |
| Skøta | 2.454 | 3.228 | 773 | 190 | 220 | 30 |
| Slógv | 14.287 | 21.365 | 7.077 | 13.694 | 16.632 | 2.939 |

| | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Steinbítur | 4.530 | 3.852 | -678 | 264 | 176 | -88 |
| Stinglaksur | 9.018 | 0 | -9.018 | 457 | 0 | -457 |
| Svartkalvi | 62.483 | 97.069 | 34.587 | 1.923 | 3.027 | 1.105 |
| Svartkjaftur | 78.192 | 160.461 | 82.268 | 14.513 | 37.099 | 22.587 |
| **Toskur** | **512.881** | **451.813** | **-61.068** | **14.631** | **12.994** | **-1.638** |
| Tunfiskur | 311 | 80 | -231 | 30 | 17 | -13 |
| Tunga | 4.920 | 3.297 | -1.623 | 173 | 113 | -61 |
| **Upsi** | **399.562** | **419.170** | **19.608** | **16.248** | **16.208** | **-40** |
| Tilsamans | 4.562.708 | 5.012.245 | 449.537 | 319.226 | 356.298 | 37.071 |